

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 03 - 2013

# Kina og Ísland samd um Miðleiðina

Kinesarar vænta, at innan sjey ár ella í 2020 verður Miðleiðin t.v.s. leiðin frá Kyrrahavinum tvørtur um Norðpólin til Norðuratlantshavið vanlig farleið fyri vøruflutninginum úr Kina til Evropa. Hetta stendur at lesa í einari fráboðan frá uttanríkisráðnum í Beijing. Har stendur, at ætlandi verður Miðleiðin opin í fýra mánaðir, og at hesa tíðina fer tað at bera til at flyta 10 prosent av tí árliga vøruflutninginum úr Kina til Evropa tann vegin. Íslendingar liggja framvið at fáa ein lut í tí komandi kinesiska flutninginum ígjøgnum Miðleiðina. Teirra hugmynd er at fáa eina altjóða vøruhavn ella umskipingarhavn í Íslandi, og í tí sambandi hevur Össur Skarphéðinsson, uttanríkisráðharri, havt fund við Huigen Yang, sum er stjóri á tí kinesiska pólstovninum. -Tað hevur sera stóran týdning fyri Ísland, at kinesarar hava somu hugsan um Miðleiðina, sum vit hava, tí farleiðin kann fáa sera stóra búskaparliga ávirkan her. Vit hava lagt dent á, at vit halda Miðleiðina vera ta bestu av ymsum orsøkum eitt nú, tá tað snýr seg um streym og ís, og tað er sera hugaligt, at stórveldið Kina hevur somu uppfatan sum vit, sigur uttanríkisráðharrin. Umframt sigling tosaðu Össur Skarphéðinsson og Huigen Yang um at skipa ein rannsóknarstovn í Íslandi, sum skal kanna norðlýsið. Tey bæði londini skrivaðu longu í fjør undir ein sattmála um hetta samstarvið.